# FRÍSKLEIKIN Í FØROYUM SKAL **ENDURFØÐA ÚTLENDINGAR**

VAKRA FØROYSKA **NÁTTÚRAN** OG SKIFTANDI **VEÐURLAGIÐ** KUNNU VERA VIÐ TIL AT **ENDURFØÐA** MÚGVANDI **ÚTLENDINGAR**, IÐ KENNA **ANDLIGAN** SAKN Í TILVERUNI. HETTA VAR EIN NIÐURSTØÐA HJÁ **SIMON ANHOLT**, SUM Í FJØR GJØRDI FRÁGREIÐING FYRI **UTTANRÍKISRÁÐIÐ** UM AT STYRKJA UMDØMI **FØROYA**. FØROYAR ERU MESTSUM PÚRA **ÓKENDAR** Í HEIMINUM, OG SKULU TÆR GERAST **KENDARI**, MUGU TÆR VÍSAST **FRAM** SUM EIN **SPENNANDI** SKANDINAVISKUR **GIMSTEINUR**, STAÐFESTI HANN



**FERÐAVINNA**

Uni Arge
uniarge@gmail.com

Talið á ferðafólkum í Føroyum minkar, visti Kringvarpið at siga herfyri, men útlitini til, at ferðafólkatalið aftur fer at vaksa, eru góð, staðfesti stjórin á ferðavinnudeildini hjá Uttanríkisráðnum, Súsanna Sørensen. Í 2006 vóru 47.000 ferðafólk í Føroyum, síðan er talið minkað við 12-15 prosentum, men í ár kemur helst vend í aftur, upplýsti stjórin á ferðavinnudeildini.

Bæði ferðavinnan og flogvinnan hava seinastu tvey árini merkt sviðan av heimsumfatandi fíggjarkreppuni, men tá avleiðingarnar av kreppuni einaferð hæsa av, kann støðan hjá føroysku ferðavinnuni aftur fara at verða mett sum vanlig. Og spurningurin í mong ár hevur verið, hvussu stendur til hjá Føroyum sum lokkandi ferðamáli undir vanligum umstøðum.

Í 2009 fekk Uttanríkisráðið enska serfrøðingin, Simon Anholt, at gera eina frágreiðing um umdømi og kappingarsamleika Føroya. Okkurt stríðsmálið stóðst av, at innlit ikki fekst í frágreiðingina, tá hon framvegis ikki var liðug, og av hesum tvídrátti hevði boðskapurin í frágreiðingini hug at hvørva. Men tilmælini í henni vóru bæði mong og fjølbroytt.

## Millum tey ókendu

Føroyingar sjálvir hava ofta ta fatan, at Føroyar eru serligar, og at fólkið í oyggjunum er gestablítt og ber við sær grundleggjandi virðir sum vísdóm og eyðmýkt, ið eru fingin til vega úr tætta sambandinum við náttúruna. Alt hetta er sambært Simon Anholt rætt. Trupulleikin er bara, at øgiliga fá í verðini vita av hesum.

Simon Anholt, sum hevur ráðgivið mongum londum um, hvussu tey kunnu styrkja sín samleika, sigur, at vanlig fólk í flestu londum eru í mesta lagi tilvitað um 30 lond í heiminum. Teirra vitan fevnir um teirra egna land og eini 14-15 onnur lond, sum tey annaðhvørt kenna, virða ella hámeta. Ofta er talan um grannalondini og so eini 10-15 lond aftrat, sum tey hava hoyrt um í fjølmiðlunum.

Fyri flestu fólk kundu øll hini 160 londini í heiminum als ikki verið til. Kanska kenna fólk nøvnini á eini 50-60 av hesum londunum, og alt eftir, hvussu væl fólk eru útbúgvin, kunnu tey hava eina ávísa vitan um londini. Men yvirhøvur er vitanin lítil, og tá tað snýr seg um eitt so lítið land sum Føroyar, er eyðsýnt, at ógvuliga fá fólk vita nakað sum helst um oyggjarnar.

Simon Anholt staðfestir, at eitt land við fáum íbúgvum, lítlum búskapi, lítlum landaøki og við sera avmarkaðari politiskari, mentanarligari og dilpomatiskari ávirkan telist millum eitt av teimum 160 londunum, sum meginparturin av heimsins íbúgvum ikki hugsar um. Sera framsøkið er tí hjá einum so lítlum landi at vilja vinna seg fram millum tey 30 londini, ið øll kenna.

> Føroyar skulu avdúkast sum tað dulda kamarið í skandinaviska húsinum. Tað er ein spennandi dreymur at finna útav, at viðurkenda skandinaviska húsið hevur eitt evarska lítið eyka kamar, ið rúmar Føroyum

## Duldarfult Shangri-la

Men hetta merkir ikki, at Føroyar als onki hava at bjóða, sigur hann. Føroyar eru tvørturímóti so sermerktar, at tær væl kunnu verða marknaðarførdar sum eitt duldarfult Shangri-la í Norðuratlantshavi, ið bara ikki er uppdagað fyrr enn nú. Umráðandi er samtundis at leggja dent á, heldur hann, at Føroyar eru partur av skandinavisku familjuni.

Skandinavia ímyndar úti í heimi hugtøk sum javnrættindi, modernitet, rættvísi, umhvørvistilvitan, álit, reinlyndi, dugnaskap, støðufesti, hámenning, gløggskygni og siðiligheit. Tá eitt land verður uppfatað sum skandinaviskt, verða hesi virðir beinleiðis knýtt at landinum. Onki er tí meira upplagt enn at knýta Føroyar at skandinavisku familjuni.

Simon Anholt skrivar: »Føroyar skulu avdúkast sum tað dulda kamarið í skandinaviska húsinum. Tað er av sonnum ein spennandi dreymur at finna útav, at viðurkenda skandinaviska húsið hevur eitt evarska lítið eyka kamar, ið rúmar Føroyum. Okkara uppgáva er at fáa fólk at droyma hendan dreymin og síðani prógva, at dreymurin kann gerast veruleiki.«

Hann leggur dent á, at tað snýr seg ikki bara um at spyrja, hvussu Føroyar kunnu gerast kendar millum onnur lond, eins og so mangan verður spurt. Tað snýr seg minst líka nógv um at spyrja, hvussu Føroyar kunnu gerast týdningarmiklar fyri onnur. Neyðugt er í tí sambandi at gera sær greitt, hvat landið hevur at bjóða, og tað er ikki so lítið, heldur Simon Anholt.

## Stórsligna náttúran

Tann, sum vitjar Føroyar fyrstu ferð, verður málleysur av náttúruni, staðfestir hann. Føroyingar sjálvir eru so vanir